## Norðurkorea slakar

Okkurt bendir á, at Norðurkorea er sinnað at slaka í spurninginum um landsins kjarnoprkuætlanir. Í hvussu er hevur stjórnin sagt kinesiska forsætisráðharranum, Wen Jiabao, at Norðurkorea er sinnað at taka kjarnorkusamráðingarnar uppaftur. Men norðurkoreanska stjórnin vil hava samráðingar við USA fyrst. Norðurkoreanski leiðarin, Kim Jong-il, skal hava sagt, at tað loysir seg ikki at tingast við hini londini, fyrr enn tey fíggindaligu viðurskiftini millum USA og Norðurkorea eru fingin av vegnum.



## Nýggj umhvørviskrøv

Í USA vil Barack Obama, forseti, hava teir almennu myndugleikarnar at ganga undan á umhvørvis- og veðurlagssøkinum. Tí hevur hann nú givið øllum landsmyndugleikum tríggjar mánaðir til at seta sær mál fyri, hvussu nógv teir skulu skerja $CO_2$-útlátið tey næstu tíggju árini. Samstundis hevur hann biðið myndugleikarnar spara orku. Millum annað skulu teir brúka minni bensin til bilarnar og spara vatn. Frammanundan hava ráðstovurnar hjá stjórnini fingið boð um at skerja bensinnýtsluna 30 prosent innan 2020.

# MBM móti krabba

**Í gjár komu nýggir mjólkapakkar á marknaðin, sum MBM hevur latið gjørt fyri at stuðla landsinnsavningini Føroyar móti krabba. MBM stuðlar tiltakinum við 10 oyrum fyri hvønn mjólkapakka**

STUÐUL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Mjólkavirkið Búnaðarmanna, MBM, er nú farið undir at stuðla landsinnsavningini Føroyar móti krabba, sum verður 31. oktober í Norðurlandahúsinum.

Tað ger MBM við nýggjum mjólkapakkum, sum vóru sendir á marknaðin í gjár. Talan er um upprunaligu mjólkapakkarnar, men við nýggjari baksíðu, har ein stuttur tekstur um krabbamein og um landsinnsavningina stendur skrivaður.

Umframt á hendan hátt at hjálpa við at varpa ljós á innsavningina, letur MBM 10 oyru av hvørjum seldum mjólkapakka til Føroyar móti krabba og stuðlar harvið virkseminum hjá Krabbameinsfelagnum við fyribyrging, gransking og sjúklingastuðli.

- Tað hevur ómetaliga stóran týdning, at føroyingar hjálpast at í stríðnum móti krabbameini, sum hevur so stóra ávirkan á okkum øll. Til landsinnsavningina er okkara boðskapur, at hvørt oyra ger mun og at onki oyra er ov lítið. Vit vóna, at føroyingar geva landsinnsavningini ans og hjálpa okkum at hjálpa øðrum, sigur Jansy Gaardlykke, ið er dagligur leiðari í Krabbameinsfelagnum.

Landsinnsavningin verður 31. oktober í Norðurlandahúsinum, og verður send beinleiðis í sjónvarpinum.




*Nýggju mjólkapakkarnir, sum komu á marknaðin í gjár. Við hvørjum seldum pakka stuðlar MBM landsinnsavningini Føroyar móti krabba við 10 oyrum* *mynd: Álvur Haraldsen*

# Ovurstórur áhugi fyri at gerast løgreglufólk

**Áhugin fyri at læra til løgreglufólk hevur í ár verið størri enn nakrantíð áður. Tað vísa tøl hjá donsku løgregluni. 400 nýggj løgreglufólk eru sett í 2009**

LØGREGLA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Áhugin fyri at gerast løgreglufólk tykist verða vaksin munandi millum fólk. Tað skrivar danska løgreglan á heimasíðu sínari. Mánadagin 2. november byrjar síðsta liðið á árinum við 144 næmingum á Politiskúlanum. Har við hevur danska løgreglan sett í alt 400 nýggj løgreglufólk í 2009.

Ríkisløgreglan metir, at 20 av teimum nýsettu í ár hava annan etniskan uppruna enn danskan, meðan í alt 80 av nýggju løgreglufólkunum upp á prøva eru kvinnur.




*Áhugin fyri at gerast løgreglufólk hevur verið ovurstórur í 2009. Tá seinasta liðið er sett við mánadagin 2. november, eru 400 nýggj løgreglufólk sett*

*mynd: www.politi.dk*

Áhugin fyri at gerast løgreglufólk er eftir øllum at døma størri enn nakrantíð áður. Um 1900 fólk hava higartil í ár søkt um at verða tikin upp á Politiskúlanum og harvið verða sett sum løgreglufólk upp á prøva, og hvønn dag eru um 1000 fólk, sum klikkja seg inn á rekrutteringssíðuna hjá løgregluni, www.blivpolitibetjent.dk. Økti áhugin er næstan ein tvífalding samanborið við sama tíðarskeið í fjør.

Nógvir føroyingar søkja árliga inn á politiskúla í Danmark, men fella inn í danska statistikkin, og sostatt er ikki til at vita, hvussu áhugin millum føroyingar er fyri starvinum sum løgreglufólk.

## Stuðulin til lesandi uttanlands minkar

**Lestrarstuðulin til lesandi uttanfyri Norðurlond skal niðurlagast úr 120.000 krónum niður í 80.000 krónur frá komandi skúlaári at rokna. Eisini er prístalsviðgerðin av stuðlinum útsett enn eitt ár**

STUÐUL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Landsstýriskvinnan í Mentamálum, Helena Dam á Neystabø, hevur lagt eitt uppskot fyri Løgtingið, har skotið verður upp at minka stuðulin til lesandi uttanfyri Norðurlond – ÚSUN-stuðulin. Broytingin kemur í gildi frá 1. August 2010, og fær tí virknað frá næsta skúlaári at rokna.

Studningur til skúlagjald til lesandi, ið fara undir hægri lestur í londum uttanfyri Norðurlond lækkar úr 120.000 krónum um árið til 100.000 krónur um árið í lestrarárinum 2010/2011, og lækkar síðani til 80.000 krónur í lestrarárinum 2011/2012.

Høvuðsendamálið við lógaruppskotinum er at tálma útreiðsluvøkstrinum nakað. Í lógaruppskotinum verður víst á, at við so stórum halli á fíggjarlógini er umráðandi, at tann samlaði játtanarkarmurin, sum verður tillutaður útbúgving, verður gagnnýttur so væl sum gjørligt.

### Fleiri næmingar og fleiri lán

Orsøkin til at neyðugt er at tálma útreiðsluvøkstrinum, er at framskrivingar av útreiðslunum til lestrarstuðul vísa, at útreiðslurnar í 2009 verða 5 milliónir krónur hægri enn mett, og at útreiðslustøðið í 2010 kemur at liggja 11,5 milliónir krónur oman fyri játtanina í 2009. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at tað eru fleiri orsøkir til vøksturin. Millum annað eru fleiri næmingar í skipanini, og gongdin í ár hevur víst munandi broytingar í lánspartinum í mun til árini frammanundan. Sostatt taka fleiri lán, samstundis sum afturgjaldingin av lánum minkar.

### Meira enn hini

Verandi studningur til skúlagjald er sera stórur í mun til hini Norðurlondini. Samlaði stuðulin til føroysk lesandi er um 210.000 krónur um árið, harav stuðulin til skúlagjald er 120.000 krónur, meðan samlaði stuðulin í Noregi er góðar 170.000 krónur og knapt 150.000 krónur í Svøríki.

Við verandi búskaparstøðu verður tí ikki mett rætt at halda á fram við hesi serskipan við eini so stórari upphædd. At minka studningin til skúlagjald úr 120.000 um árið fer helst at raka einar 30 næmingar av teimum um 160, sum eru í ÚSUN-skipanini, og sum frálíður fer broytingin at merkja eina sparing upp á 1,1 millión krónur í 2012.

Harafturat er ætlanin eisini at taka prístalsjavningina av stuðlinum burtur í eitt ár aftrat soleiðis, at lestrarstuðulin heldur ikki verður prístalsjavnaður komandi lestrarár, sum byrjar 1. august 2010. Mett verður, at prístalsjavningin í 2010 hevði verið um 0,9 millión krónur. Tann 1. august 2011 verður prístalsjavningin sett í gildi aftur.

Samanumtikið verður stóri stuðulin til skúlagjald minkaður nakað, og prístalsjavningin verður sett úr gildi í eitt ár, um lógaruppskotið verður samtykt. Hetta verður gjørt fyri at tálma útreiðsluvøkstrinum, millum annað fyri at neyðugt útbúgvingarvirksemi kann halda fram.

Stuðulin til livikostnað og ferðastuðulin verður framvegis tann sami.